# Mykines hýsir útoygg

**Tað varð samtykt á aðalfundinum hjá Útoyggjafelagnum leygardagin. Henda seinasta stevnan varð sett í Fugloy, í Hattarvík. Aðalfundurin var í skúlanum í Hattarvík, og tann einasta, lítla skúlastovan í hesum lítla bygdarskúla var kjokkfull av fólki. Stevnugestirnir fyltu nógv í teirri fólkalítlu oynni, sum úr erva líkist einari dunnu. Búgva 20 fólk á Kirkju og í Hattarvík, so er tað eisini alt. Fólkatalið í Fugloy minkar og minkar. Lítið skal til, at tað ikki longur er nakað fólkatal at minka av**

ÚTOYGGJASTEVNA
*Sonne Smith*

Frøi var á fundarfólki í skúlanum, tá ið tað varð avrátt, at Mykines er ráðstevnuoyggj í 2008. Tað sást serliga væl á Esbern í Eyðanstovu, sum annars situr í starvsnevndini hjá Útoyggjafelagnum. Kona hansara, Katrina, situr í umboðsráðnum. Hon umboðar altso Mykines. Tað er valla kollgitt, at fleiri longu ta løtuna í Hattarvík sóu fyri sær, hvussu tey kundu hugsað sær at lagt ferð sína til Mykines til rættis. Kortini verður Mykines straffað, nú Strandferðslan hevur boðað frá, at hóast ferðaseðlaprísurin fer niður í eina helvt á farleiðunum yvirhøvur, verður prísurin tann sami sum higartil á Mykines-leiðini. Spell, tí Mykines er einasta útoyggj, ið hevur matstovu at bjóða sínum gestum. Enntá eina góða matstovu.

## Pengar

Eisini á hesum aðalfundinum varð tosað um pengar og aftur pengar. Í hesum føri varð sum ikki einaferð tosað um tvørrandi pengar. Her var eingin politikari hjástaddur. Onkur helt fyri, at tað kundi gera tað sama. Útoyggjafelagið fær onga játtan. Politikarar geva ikki felagnum ans, og tað kom sjálvandi fram. Onkur annar helt fyri, at Útoyggjafelagið var nógv betur farið við als ikki at blanda politikk uppí. Felagið skal gera nakað sjálvt. Av sínum eintingum. Framtíðin er og verður ferðavinnan. Glottar eru fyri framman, hóast seint gongur. Útoyggjafelagið arbeiðir við tankanum um at fáa vistarhaldsskipan í lag í útoyggj. Fyrimyndin kundi verið tann skotska, eingilska, írska Bed & Breakfast-skipanin (B&B). Latið ferðafólk fáa okkurt at gista í. Tað ber væl til, og tað hevði drigið ferðafólkini til sín. Latið tey fáa nøkur rein og nosslig toilett. Latið tey fáa tak út yvir høvdið,





*Álitismaðurin Jóannes Christiansen, bóndi á Kirkju*
*Mynd: Eirikur Ólason Simonsen*



*Hanus Hansen, bóndi í Hattarvík, setti stevnuna*
*Mynd: Frits Jacobsen*



*Símun Gullaksen, elsti maður í Hattarvík, og Jákup Næss. Mamma hansara er ættað av Kirkju*
*Mynd: Eirikur Ólason Simonsen*